# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI · TEKNISKI SKÚLIN



## Leiðaraútbúgving fyri byggivinnuna vár 2008

**Í februar byrjar nýggj útbúgving innan byggivinnuna, har tú fært grundleggjandi leiðsluførleikar at reka eina byggifyritøku ella stýra einari arbeiðstøku. Útbúgvingin er løgd til rættis saman við Vitus Bering Danmark.**

Tað er umráðandi at verða førur fyri at stýra og leggja eina framleiðslu til rættis. Sum leiðari kanst tú verða tann heilt avgerandi persónur, ið er førur fyri at geva íblástur og motivera tey starvsfólkini, tú ert leiðari fyri og onnur, tú hevur samstarv við. Útbúgvingin vendir sær til nýggjar og komandi leiðarar.

Undirvísingin fer fram sum blandað læring, t.v.s. tímar við persónligari vegleiðing, hjáveru undirvísing og undirvísing umvegis internetið.

**Hvør kann luttaka í leiðaraútbúgvingini fyri byggivinnuna?**
Tað kunnu øll við:

- Einari vinnuútbúgving innan bygging og anlegg
- Minst 2 ára vinnuroyndir
- Leiðararoyndum sum formaður, arbeiðstakari ella meistari

**Útbúgvingin er í 4 modulum**

- Leiðsla
- Búskapur
- Lean framleiðslustýring
- Marknaðarføring

**Útbúgvingarprógv**
Eftir reglum í kunngerðini um opna útbúgving verður modulprógv givið fyri staðið modul, samstundis verður eitt Europass givið.

Til ber at tekna seg til einstøk modul ella útbúgvingina sum heild.

**Tíð:** **Leiðsla: modul 1, byrjar 7. februar 2008**
**Skeiðheildari:** frá Vitus Bering Danmark
**Kostnaður:** kr. 9.500,00 fyri hvørt modul
**Tilmelding:** áðrenn 24. januar 2008

**Lesið meira um útbúgvingina á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

SENDISTOVAN

Marknagilsvegur 75, Postsmoga 3239, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

---

NES KOMMUNA
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Námsfrøðingur

Til Dagrøktina í Nes kommunu verður søkt eftir námsfrøðingi, at arbeiða umleið 30 tímar um vikuna, til ein 2 ára gamlan drong við spastisiteti, at byrja skjótast til ber ella eftir avtalu.

Námsfrøðingar sum fáa prógv í febr. 2008, kunna eisini søkja.

Um eingin námsfrøðingur søkir starvið, verður hjálparfólk sett.

**Arbeiðið umfatar:**

- At stuðla dronginum í spæli saman við øðrum børnum
- At fara til fysioterapi, ergoterapi og møguliga onnur tiltøk
- At stimbra og annars geva honum ein innihaldsríkan dag

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, pedagogurin í skala 11-17 og hjálparfólkini í skala 1-5.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skullu verða Nes Kommunu í hendi innan 25.01.2008 kl. 12.00.

Nærri fast at vita um starvið við at ringja á tlf 448462 ella 565020 og tosa við Katrin Poulsen dagrøktarleiðara.

**NES KOMMUNA**
**650 Toftir**
**www.nes.fo**
**nes@nes.fo**

---

# Koyri-kort?

Teoriskeið
til persónbil
byrjar
**týsdagin**
**8. januar**
**kl. 17.00**

Teoriskeið
til lastbil, buss
og trailara
byrjar
**mikudagin**
**9. januar**
**kl. 19.30**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**John A. Christiansen**
**tel 21 47 75**

**Rúni Christiansen**
**tel 21 47 65**

Jekaragøta 10 • Tórshavn

www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

---

# Fólk søkist

**Vit søkja eftir smiðjun, stál skipasmiðjum, sveisarum, mekanikarum og líknandi til arbeiði í Noreg skjótast gjørligt.**

Arbeiði umfatar klassing, umvæling og nýgerð av boripallum, supplyskipum, nýbygningum o.ø. innan offshore ídnaðin.

Arbeiðstíðin er 4 vikur úti og 2 vikur heima.

Góð løn verður givin.

Meira fæst at vita um arbeiðið, umstøður og treytir við at ringja ella skriva til undirritaða felag.

OILWIND

**Pf. J. K. JOENSEN & SONUR**
Tlf 332 422 · Fax 333 222 · t-postur: oilwind@oilwind.fo
Uttanfyri arbeiðstíð kann ringjast til fartlf. 212 422

---

MIÐVÁGS KOMMUNA

# KUNNGERÐ

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. Mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður við hesum gjørt kunnugt, at Miðvágs bygdaráð á fundi 12. novembur 2007 samtykti at broyta býarplanin fyri Miðvágs kommunu soleiðis, at ein partur av matr. nr. 208a á Gutthústrøðni í Miðvági verður lagt sum B-øki.

Kort, sum vísir broytingina, liggur frammi til alment eftirlit á bygdaráðsskrivstovuni í arbeiðstíðini frá mánadegnum 07. januar til mánadagin 28. januar 2008 báðir dagar íroknaðir.

Møgulig broytingaruppskot ella mótmæli skulu skrivliga verða bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 07. apríl 2008.

**Miðvágs Kommuna**

---

SUNDA KOMMUNA

## Kommunustýrisfundir 2008

Bygdaráðið hevur á fundi tann 17.12.2007 samtykt at áseta almennu fundirnar hesar dagar.

| | | |
|---|---|---|
| Mánadagin | 28. januar | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 25. februar | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 31. mars | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 28. apríl | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 26. mai | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 30. juni | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 25. august | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 29. september | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 27. oktober | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 10. november | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 24. november | kl. 19.00 |
| Mánadagin | 15. december | kl. 19.00 |